Vælkomin til dyst í Fløtugerði

# ÍF – KÍ

Sunnudagur 12. apríl 2015




Minst til limagjaldið!
Sí http://www.if.fo

Mynd: Álvur Haraldsen

HAVSBRÚN

effo deildin

# Dysturin í dag

Birgir Petersen
*ábyrgdarblaðstjóri*

## Vælkomin til Effodyst á Fløtugerði í Fuglafirði

Í dag taka vit ímóti KÍ, sum er í nakað tí somu støðuni sum vit: Teir eru ikki ordiliga komnir í gongd við at fáa stig á kontuna. Teir hava einans 5 stig eftir 5 umfør, og kann tað ikki vera nøktandi, tá hugsa verður um teirra málsetning. Liðið hjá KÍ tykist sera spennandi, við nógvum góðum lokalum leikarum og so hava teir fingið styrk uttanifrá og skift venjara. Nýggi venjarin hevur vunnið FM nakrar ferðir, og er hetta heilt greitt orsøkin til at KÍ hevur valt at seta Mikkjal Thomassen við stýrisvølin. Okkara menn eru heldur ikki ordiliga komnir í sving og er tað ikki sørt av trýsti á um at fáa ein sigur í hús, tí við ov nógvum javnleikum, og tapum fyri so vítt, er skjótt at enda í tyngra endanunm av stigatalvuni. Tað tykist, sum vit hava ikki heilt funnið okkara spælistíl enn við tí nýggja venjaranum og teimum broytingum, sum annars hava verið. Kanska vit hava verið ov varnir, og ikki vilja taka tjansir. Hetta eru vit tó ikki einsamallir um, tí byrjanin av kappingini í ár er sermerkt av at meira enn helmingurin av dystunum higartil eru endaðir javnir.

Alex Jovevic sigur at hann arbeiður við øllum spælarunum, har framgongd og tilrættalegging er sera týdningarmikið. Teir arbeiða við øllum lutum, ið hoyra beinleiðis fótbóltinum til, og ymsum meira óbeinleiðis sum matvanar og lívsstílur annars. Hvør einstakur spælari skal behandlast uppá ein serstakan máta, har hugt verður eftir ymiskum prestatiónum og hvussu hesar kunnu gerast enn betri. Hann sigur at vit hava fleiri spennandi ungar spælarar, sum kanska fara at sláa til í ár, hann vil ikki nevna nøvn, tí hetta leggur óneyðugt trýst á spælarnar, "wait and see" sigur Joveviv bara við sinum smittandi smíli.

*Koyri á dreingir*
*Góðan dyst øll somul*

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Í 2014 gekk tað soleiðis:** | | | |
| 1 | 16-03-2014 | ÍF-KÍ | 1-3 |
| 12 | 09-06-2014 | KÍ-ÍF | 4-0 |
| 19 | 17-08-2014 | ÍF-KÍ | 1-1 |
| **Í 2013 gekk tað soleiðis:** | | | |
| 19 | 10-08-2013 | KÍ-ÍF | 2-2 |
| 15 | 28-06-2013 | ÍF-KÍ | 3-1 |
| 6 | 21-04-2013 | ÍF-KÍ | 3-3 |
| Í 2012 gekk tað soleiðis: | | | |
| 19 | 11-08-2012 | ÍF-KÍ | 5-2 |
| 4 | 15-04-2012 | ÍF-KÍ | 2-0 |
| 14 | 24-06-2012 | KÍ-ÍF | 1-0 |
| Í 2011 gekk tað soleiðis: | | | |
| 3 | 21-04-2011 | ÍF-KÍ | 0-1 |
| 10 | 27-05-2011 | KÍ-ÍF | 2-0 |
| 19 | 27-08-2011 | ÍF-KÍ | 0-1 |
| **Í 2009 gekk tað soleiðis** *(í 2010 var KÍ í 1.deild)*: | | | |
| 5 | 03-05-2009 | ÍF-KÍ | 1-0 |
| 14 | 24-06-2009 | KÍ-ÍF | 3-2 |
| 23 | 12-09-2009 | ÍF-KÍ | 5-0 |
| Og í 2008 gekk tað soleiðis: | | | |
| 4 | 26-04-2008 | ÍF-KÍ | 2-2 |
| 15 | 12-07-2008 | ÍF-KÍ | 1-0 |
| 25 | 05-10-2008 | KÍ-ÍF | 4-2 |

**ÍF FÓTBÓLTUR**
Postrúm 94 · 530 Fuglafjørður
Tel 444 636 · Fax 444 634 · if@if.fo
www.if.fo

**LEIKSKRÁIN:**
Útgevari: ÍF-fótbóltur
Ábyrgd: ÍF fótbóltur / Birgir Petersen
Uppsetan: NiNG - Tel 215 315



HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Box 81 • 530 Fuglafjørður • tel. 414400 • fax 414401
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo

# TIPPIKAPPING

Sum nakað nýtt, so fara vit at hava eina tippikapping, har tú hevur møguleika fyri at tippa komandi umfar í effo deildini, umframt ein av málskjúttunum pr. dyst. Reglurnar fyri at luttaka eru sera einfaldar: Tú tippar allar dystirnar, umframt at tú skrivar navnið á leikaranum, ið tú væntar megnar at skjóta eitt mál. Skriva síðan navn og telefonnummar á seðilin, og lat hann inn í kioskina í ítróttarhúsinum seinasta lagi 15 minuttir eftir at dysturin í dag er liðugur.

| Heimalið | Útilið | 1 | X | 2 | Málskjútti |
|---|---|---|---|---|---|
| NSÍ | AB | | | | |
| FC Suðuroy | HB | | | | |
| TB | Víkingur | | | | |
| ÍF | B36 | | | | |
| KÍ | EB/Streymur | | | | |

Navn:

Telefonnummar


NORÐOYA SPARIKASSI

Saman finna vit bestu loysnina
- Vælkomin til eitt kundaprát í sparikassanum

Ynskir tú at hoyra nærri um hvørjar tænastur vit kunnu bjóða tær. Alt frá barnasamansparing, billáni, bústaðarláni, pensjónssamansparing og aðrar fíggjarmøguleikar ella kanska vegleiðing til at nýta netbankan, ert tú vælkomin til eitt kundaprát í sparikassanum




Bílegg eitt kundaprát
á tel. 47 5000

Norðoya Sparikassi Ósávegur 1 Postboks 149 FO-710 Klaksvík Tel. 47 5000 Fax 47 6000 ns@ns.fo www.ns.fo





Fuglafjarðar
Keypssamtøka

tel 660020
fax 444895 | far 217095

Opið er mánadag - leygardag frá kl. 9 - 22
Sunnudag er stongt!

# SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum skatti
Afturrindan av mvg
Eftirlønum

sansir.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

**SPEKT** | løggildir grannskoðarar



Linde Gas ] **AGA**

# FØROYA GASSØLA

Ídnaðar- og propangass
Skeriútgerð
Sveisiútgerð
Hitaovnar
Gassútgerð
Stórkøksútgerð
Køligass

**Opnigstíðir:**
Mána. - Fríggjadag
8:00 - 17:00
Tlf. 315544
e-mail: gassola@gassola.fo

**www.gassola.fo**







## Fuglafjarðar kommuna hevur eina sera livandi heimasíðu. Har er m.a.

- Svartatalva
- Barnaverndin
- Brandstøðin
- Fuglafjarðar skúli
- Barnaansing
- Eldrarøkt
- Kunningarstovan
- Ruskøkið
- Leið 410
- Frítíðarskúlin
- Læknin
- Sosiala deild

*...og nógvar aðrar tænastur*

**Fuglafjarðar kommuna**

# TIPS 13

Tips 13 er nýggj kapping, har ein leikari og ein fjeppari fáa 13 fótbóltsspurningar, og hava tey/teir 3 valmøguleikar pr. svar. Fimm teir fyrstu spurningarnir eru um viðkomandi leikara, ið verður spurdur, í meðan teir írestandi átta eru vanligir fótbótlsspurningar. Í teimum fyrstu 5 spurningunum fær leikarin hálvt minusstig, um hann ikki hevur rætt svar. Annars telur rætt svar 1 stig. Spælt verður eftir "vinnarin situr"-leistinum og skal taparin, so senda víðari til næsta mann/kvinnu í røðini.

Jan Ó. Ellingsgaard tapti síðsta heimadyst móti Kristian Sofus Petersen, og sostatt er støðan 1-0 til fjepparamar. Jan sendi víðari til Frank, sum skal umboða leikararnar hesuferð. Vit góvu Frank og Kristian Sofus møguleikan at vedda sínamillum, men teir tóku ikki av.

Úrslitið í dag bleiv 9-4 til Frank, og merkir hetta, at Kristian Sofus skal senda víðari. Valið hjá Kristian Sofus fall á Trúgva Nesá. Hesir báðir koma sostatt at dystast í 7. umfari, tá B36 kemur á vitjan.

Um tú vilt vita tey røttu svarini, so standa tey niðast á hesi síðuni.

| Nr. | Spurningur | 1 | X | 2 | FHP | KSP |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Hvat ár er tað besta hjá Frank, um hugsað verður um nøgd av dystum? | 2010 | 2009 | 2007 | 1 | 0 |
| 2 | Frank debut fyri besta liðið í 2004. Hvønn bleiv hann skiftur inn fyri? | Magna á Lakjuni | Bárður á Lakjuni | Høgna Zachariassen | 1 | 0 |
| 3 | Frank skeyt sítt fyrsta mál í 2006. Hvør var málmaðurin, ið Frank skoraði í móti? | Jákup Mikkelsen | Meinhardt Joensen | Geza Turi | 1 | 0 |
| 4 | Frank fekk sítt fyrsta, og higartil einasta, reyða kort í móti TB í Fuglafirði. Hvør vísti Frank av vøllinum? | Jón Kári í Brekkuni | Alex Troleis | Rúni Gaardbo | 1 | 0 |
| 5 | Sambært Faroesoccer er Frank skrásettur fyri nakrar landsdystir. Hvør er úrtøkan? | 3 dystir og 1 mál | 1 dyst og 1 kort | 2 dystir og 1 kort | 1 | 1 |
| 6 | Hvussu eitur heimavøllurin hjá Juventus? | Juventus Stadium | Delle Alpi | Stadio Olimpico | 1 | 1 |
| 7 | Hvør hevur spælt flest dystir fyri Arsenal? | Tony Adams | David O'Leary | David Seaman | 0 | 0 |
| 8 | Hvussu nógvar dystir spældi Roy Róin fyri besta liðið hjá ÍF? | 255 | 262 | 269 | 0 | 1 |
| 9 | Hvør leikari hevur metið fyri flest kappingarár á besta liðnum hjá ÍF | Bartal Eliasen | Torkil Hansen | Ken Bærentsen | 0 | 0 |
| 10 | Hvør er liðskipari hjá Sevilla? | Fernando Navarro | José Antonio Reyes | Ever Banega | 1 | 0 |
| 11 | Hvørji 3 kappingarár var Andrew av Fløtum IKKI á HB liðnum? | 2003, 2004, 2005 | 2004, 2005, 2006 | 2005, 2006, 2007 | 0 | 0 |
| 12 | Í 1996 spældi Føroyar ein landsdyst móti Slovakia á Svangaskarði. Dysturin endaði við 1-2 tapi. Hvør skeyt føroyska málið? | Jan Allan Müller | Øssur Hansen | John Petersen | 1 | 0 |
| 13 | Hvør spælir sínar heimadystir á Turf Moor? | Hull | Burnley | Leicester | 1 | 1 |
| | Tilsamans | | | | 9 | 4 |

*Svarini eru: 1=2 | 2=x | 3=x | 4=1 | 5=2 | 6=1 | 7=x | 8=x | 9=2 | 10=1 | 11=x | 12=1 | 13=x*




KJ HYDRAULIK veitir
• Tvíkiljur
• Alirìngar
• Alibesløg
• Iveco motorar
• Palfinger sjókranar
• Kapstanar og spøl
• og mang annað
Vit hava á goymslu:
Hydraulikk pumpur, hydraulikk motorar, hydraulikk ventilar, hydraulikk slangur-, rør- og fittings, hydraulikk filtur, smyrjiolju- filtur, brenniolju filtur, legur, koblingar og koblingshúsar, magnetkoblingar, tætningsringar, stempul, stempulstengur og mangt annað.
Vit eru sølu- og tænastuumboð fyri:
Rapp Hydema, Rapp Bomek, Rapp Hydema Syd, Palfinger HTC, CranePower, Rotzler Winches, Pullmaster, Parker- Denison Hydraulics, Bosch-Rexroth Hydraulics, Eaton- Vickers Hydraulics, Sauer-Danfoss Hydraulics, JCB, Huldig, Iveco Motors, Donaldson Filtration o.fl.
Fjølbroyttur veitari til vinnuna
KJ HYDRAULIK er ein fjølbroytt fyritøka, sum veitir útgerð, eykalutir og tænastu til alivinnuna, skipaflotan, flutningsvinnuna og entreprenørvinnuna.
PALFINGER
PALFINGER MARINE
HYUNDAI
Set teg í samband við okkum í Havn ella á Kambsdali, ring 40 70 00
KJ HYDRAULIK
POWER & MOTION CONTROL
Kambsdalur: Postsmoga 110 / Tórshavn: Mykinesgøta 5 · Tel 40 70 00 · Faks 40 70 01 · info@kj.fo · www.kj.fo


Restaurant
Muntra
STUÐLAÐ ÍTRÓTTINUM
OG MENTANARLÍVINUM Í
FUGLAFIRÐI SÍÐAN 1972
FO-530 FUGLAFJØRÐUR
TLF. 444081 · 444039
FAX 444954 · FAROE ISLANDS


Vit gera
– vegir
– gongubreytir
– tún
– parkeringsøkir o.a.
Vit planera
og fresa eisini
www.hj.fo
HJ ASFALT SP/F
Postsmoga 28 | FO-700 Klaksvík | Faroe Islands | Tel. 458800 | Fax 458801
Heri Jacobsen | Fartel. 227910 | Jóhannes Rasmussen | Fartel. 220179


Kloakk og vatn · hiti og sanitet · alt til baðirúmið
SK
SVENDKROSSTEIN
Pf. Svend Krosstein · Falkavegur 6 · Postboks 3229 · FO-110 Tórshavn
Tel. +298 344 600 · Fax +298 344 601 · www.krosstein.fo · krosstein@krosstein.fo
SENDISTOVAN

# Leikarin í dag:




**Navn:**.......................................... Sjúrður Jacobsen
**Føðingardagur:**......................... 29-08-1976
**Føðistað:**..................................... Tórshavn (uppvaksin á Glyvrum)
**Starv:**........................................... Arbeiðsformaður á Nevið Fiskaexport
**Pláss á vøllinum:**....................... Sentralur miðvallari ella vinstri bakkur
**Yvirtrúgv:**.................................. Brúki altíð handskar tá eg spæli (sjálvt um veðrið er gott )
**3 orð sum lýsa teg:**.................. Loyalur, lættsintur og lítilátin.
**Torførasti mótstøðumaður:**..... Tað hava verið fleiri harðir "hundar" sum man hevur spælt ímóti í karrieruni - av teimum sum spæla í dag kunnu nevnast millum annað Dmitrije Jankovic og Hans Jørgen Djurhuus og okkara egni Bartal Eliasen...men eingin tekur Pól Jóhannus Justinussen - hann er eitt tanks.
**Frítíðarítriv:**.............................. Hyggja eftir einum góðum filmi ella lesa eina góða bók. Annars fer tann mesta frítíðin til damuna.
**Vónir fyri 2014:**....................... Eg vóni at ÍF fær eitt gott kappingarár og at eg kann verða við til at hjálpa ÍF enda so langt uppi á stigatalvuni sum møguligt.

## Tín Ítrótt:

**Fyrsti dystur á 1. liði:** í 1995 fyri NSÍ ímóti B71 á Sandi.
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** 1.mars í ár ímóti Víkingi í Gøtu.
**Aðrar ítróttargreinar:** Mær dámar væl at hyggja eftir tennis...
**Minningarríkasti dystur:** Steypafinalan í 2002, tá NSÍ vann 2-1 ímóti HB í Løgmanssteypsfinaluni. Ein annar minningarríkur dystur er mín fyrsti og einasti A-landsdystur sum var ímóti Likstenstein, sum eisini var í 2002...eisini var dysturin hjá NSÍ ímóti VB/Sumba í næstsíðsta umfarinum í 2007 sera minningarríkur, tí tað var tann dysturin sum tryggjaði NSÍ teirra fyrsta meistaraheitið nakrantíð...
**Størstu fótbóltsliga ávirkan:** Í Føroyum er trupult at siga. Jens Martin Knudsen hevur verið ein "kult hetja" í Runavík tá eg var yngri, og annars eisini "Landskrona-hetjurnar" frá 1990 hevur man sæð upp til. Í útlandinum vóru tað serliga spælarar sum Michael Laudrup og Zinedine Zidane sum mær dámdi ótrúliga væl. Í nýggjari tíð má nevnast Steven Gerrard sum ein av teimum størstu fyrimyndunum .
**Besti fótbóltsleikari:** Tað hava verið sera nógvir góðir spælarar sum man hevur møtt ígjøgnum tíðina, sum til dømis spælarar sum Fróði Benjaminsen, Súni Olsen, Jákup á Borg, John Petersen, Heðin á Lakjuni, Hallur Hansson - allir fantastiska góðir spælarar. Men tann besti spælarin eg havi spælt ímóti er Andrew av Fløtum - ein sera klókur spælari!
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** Eg hevði spælt tennis!
**Hvat slag av venjing dámar tær best:** tekniska venjing, sum til dømis at jongelera við bóltinum.
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** sprintir. Eisini dámar mær illa tá vong-spælarnir skulu leggja innlegg innfyri, tí tað blívur ongantíð so flott sum teir ætlaðu tað.

## Tínir favorittar:

**Matur og drekka:** Førooyskur matur er gott - sum til dømis seyðarhøvd, ræst kjøt, ræstur fiskur - men eisini dámar væl kylling, pizza og enskan búff.
**Slag av tónleiki:** mær dámar allan møguligan tónleik. Coldplay eru góðir, men ein bólkur sum eitur A Great Big World dámar mær væl.
**Sjónvarpssending:** 3-2 hyggur man eftir, og man roynir altíð at hyggja eftir Premier League fótbólti leygardag. Annars er ein røð, sum eitur "24 tímar" sum mær dámar sera væl.
**At slappa av:** "Hjemmehygg" saman við damuni.
**Troyggja nr.:** 4
**Besti fótbóltsleikari nakrantíð:** Mær dámdi sera væl Diego Maradona sum yngri, men eg haldi at landsmaðurin hjá honum, Lionel Messi, er tann besti fótbóltsleikarin nakrantíð.
**Sjónvarp/filmstjørna:** Mær hevur altíð dámt væl Mel Gibson.

*framhald á síðu 20*










Ung í Eik
www.eik.fo/ung
Tel. 346000

Eik



VØRUHÚSIÐ

TEL 54 25 00



Allar vanligar umvælingar
Dekksøla
Viðlíkahald

**Bilverkstaðið á Kambsdali**
**Tlf. 441111**






**Eitt trygt grundarlag**

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkaraarbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

# Virkislýsing: JT electric



Stovnað í 1972
Stjóri: Rói Kalsø
Slagorð: Í tryggum hondum!
Visión: Gerast yndisveitarin av el-tekniskum dygdarloysnum
Starvsfólk: 22

## Visti tú, at:

- JT electric var fyrsta virki at gera undirvatnsljós til aling av atlantslaksi?
- JT electric var fyrsta virki at senda myndir tráðleyst frá einum troli upp til skipi?
- JT electric hevur selt sínar vørur í 22 londum kring allan heim?
- Starvsfólk hjá JT electric hava javnan tiltak fyri ungum teknikarum fyri at kveikja hugin og at skapa eitt forum innan hetta økið?
- Vann heiðursløn á seinastu IceFish-messuni fyri arbeiði við TrawlCamera LIVE?

JT electric er eitt virki, sum er deilt upp í 2 deildir. Tænastudeildin veitir el-tænastur til virkir og stovnar kring alt landið. Framleiðsludeildin mennir og framleiðir egnar vørur.

## Egnar vørur:

**OceanCamera:** Undirvatnskamera mest brúkt til alivinnuna
**TrawlCamera:** Undirvatnskamera brúkt til fiskiskap, gransking og trolmenning
**OceanLite:** Undirvatnsljós til alivinnuna
**OceanCable:** Sterkur kaðal til alskyns brúk
**AUS:** Logging av ilt og hita
**FeedingBarge:** Fóðurflaki til alivinnuna






JT electric – Kambsenni 9 – 530 Fuglafjørður – WWW.JT.FO – INFO@JT.FO
Tel.: (+298) 20 44 44 – Vakttel.: (+298) 77 44 44





*framhald frá síðu 12*

**Besta bók/blað:** Ein bókin "Addicted", sum er um lívið hjá fyrrverandi Arsenal verjuleikaranum, Tony Adams.

**Stuttligasti persónur:** Uha, ein sera trupul spurningur...har hava verið nógvar stuttligar typir upp ígjøgnum tíðina, sum til dømis Djóni N.Joensen, Pól Thorsteinsson, Einar Tróndargjógv, men tann stuttligasti er nokk Jens Martin Knudsen, sum er í einum klassa fyri seg, bæði so og so.

**Stuttligasti í ÍF hópinum:** Eisini ein trupul spurningur! Har eru nógvar festligar typir. Bartal Eliasen, Kristoffur Jakobsen og Fritleif í Lambanum eru allir stuttligir uppá hvør sín máta. Karl Løkin og Ari Ellingsgaard fáa altíð lív í umklæðingarrúmið og Andy Olsen er ein tann festligasti persónurin eg kenni, men eg haldi faktiskt at Frank Poulsen er tann stuttligasti persónurin í hópinum. Frank er ein fantastiska festlig typa.

**Besti ÍF áskoðari:** Eg eri somikið nýggjur í felagnum, so eg fari ikki at nevna nøkur nøvn.

## Leikarafakta:

- Sjúrður er millum mest royndastu leikararnar í Føroyum. Spældi fyrstu ferð í bestu deildini í 1995, og er sostatt í gongd við sitt 21. Kappingarár.
- Hann er skrásettur fyri dystir í fremstu, næst- og triðfremstudeildini, umframt at hava spælt í steypakappingini, Stórsteypadyst, Atlantic Cup, Champions League, Euro League, UEFA Cup og Intertoto Cup, umframt ein A-landsdyst og ein U19 landsdyst.
- Tilsamans hevur hann spælt 465 dystir, skotið 54 mál, fingið 38 gul og 4 reyð kort í øllum kappingum síðan 1994.
- Sjúrður er ein "culthero" í barndómsfelagnum NSÍ, sum er einasta felag, hann hevur umboðað, áðrenn hann skifti til okkum.
- Tá Sjúrður avgjørdi at koma til okkum, fekk hann eina takkarkvøðu frá nsi.fo.
- Fyrrverandi ÍF-leikarin Sigurjón Einarsson legði eina mynd á Facebook við hesum teksti í 2012, tá tað stóð á hjá NSÍ: "Eg haldi, at Sjúrður á Langanesi er við at blíva ein kult-hetja. Ein leikari, ið altíð hevur leikt við hjartanum á rætta stað, meðan aðrir hava runnið eftir pengunum" - Takk fyri, Sjúrður!
- Sjúrður er íðin Liverpool fjeppari.
- Á facebook hevur hann endurgivið bæði fyrrverandi Liverpool venjaran, Rafa Benitez, og Barcelona-leikarin Xavi á síðuni við yndissitatum.
- Besta kappingarárið hjá Sjúrður, um hugsað verður um mál, var í 1996, tá hann skeyt 13 mál í 22 dystum. Um hugsað verður um dystir, so eru 2003 og 2012 best, tá hann samanlagt leikti 29 dystir.
- Hansara einasti A-landsdystur var ímóti Liktinstein á Tórsvølli, har Føroyar vann 3-1. Hann varð innskiftur í 73. minutti. Aðrir fyrrverandi ÍF leikarar, sum spældu hendan dagin eru Jákup Mikkelsen, Helgi L. Petersen og Rógvi Jacobsen.

# Vit eiga nøkur bein á mótstøðuliðnum

Í hesum teigi royna vit at finna fram teir á dagsins mótstøðuliðið, sum eru ættaðir úr Fuglafirði.

Hjá klaksvíksingum eiga vit nakrar. Mest eiga við í Heðini á Lakjuni, ið er sonur Victor hjá Mariu og Jákup Oluf á Lakjuni. Sostatt er Heðin hálvur fuglfirðingur. Um Heðin spælir í dag, so spælir hann dyst nummar 408 í bestu deidini, sum er føroyskt met. Í løtuni deilir hann metið við Egil á Bø við 407 dystum. Heðin er somuleiðis einasti leikari sum hevur verið meistari við trimum feløgum KÍ 1999, B36 2001 og HB 2004.

Heðin Klakstein er fjóðrings fuglfirðingur. Heðin er sonur Eyðun og Báru.

Eyðun er sonur Jórun hjá Margretu og Esmar Simonsen, "smiðjumeistaranum".

Bæði mamman Bára og Eyðun hava gjørt um seg í fótbóltsheiminum. Pápin Eyðun leikti í 1992 við ÍF og gjørdi 7 mál í 11 dystum.

Jóannes Bjartalíð er somuleiðis fjóðrings fuglfirðingur. Pápin er eitur Jan og er sonur Elisabeth hjá Tummas og Lenu Nón.

Fara vit eitt vet longur, so er Sørmundur Kalsø ein áttindaparts fuglfirðingur.

Sørmundur er sonur Hennibeth og Bjørn Kalsø landsstýrismann. Mamman Hennibeth er dóttir Mariu, sum er dóttir Solby hjá Nikulinu og Christian Thomsen, Norðuri á Bakka.

Nú hava vit roynt at kradda okkum nøkur bein úr Klaksvík, so mugu vit eisini takka teimum fyri teira frálíka fryntligu og góðu leikarar sum vit hava úr Klaksvík: Kristoffur Jakobsen, Poul Nolsøe Mikkelsen og John Daniel Gudjónsson.












ASKUR eitur nýggja limaskipanin hjá ÍSF, sum alt fleiri feløg nú brúka. ÍF hevur nú knýtt seg upp í skipanina, og hetta merkir, at allir limir skulu gjalda limagjald og/ella skráseta limaskap umvegis nýggju skipanina á hesi síðuni.

Nýggja skipanin hjá ÍSF hevur til endamáls at skráseta øll ítróttafólk í Føroyum, og tá spælarar í ÍF gjalda limagjaldið og/ella skráseta limaskapin her, eru teir samstundis skrásettir sum íðkandi undir ÍSF – og sjálvandi eisini sum limir í ÍF.

Við nýggju skipanini verður ikki longur møguligt at gjalda limagjald og/ella skráseta limaskap við vanligari flyting umvegis bankan. Nógv umsiting hevur verið av tí, og nú øll gjøld fara um nýggju skipanina, lættir tað munandi um hjá felagnum umsitingarliga.

Vónandi lættir nýggja skipanin eisini um hjá foreldrum og spælarum, sum skjótt og lætt kunnu gjalda limagjøldini og skráseta limaskapirnar her. Felagið heitir á øll um at gjalda limagjald og skráseta limaskap nú! Tá limagjaldið er goldið, og limaskapurin skrásettur, er spælarin eisini limur í tryggingarskipanini hjá ÍSF.

Sí meira á www.if.fo

# HAGTØL

## FAROE SHIP

### HETTA UMFARIÐ:

| | |
|---|---|
| 4/11/15 | EBS - Víkingur |
| 4/11/15 | FCS - AB |
| 4/12/15 | B36 - TB |
| 4/12/15 | NSÍ - HB |
| 4/12/15 | ÍF - KÍ |

### KOMANDI UMFAR:

| | |
|---|---|
| 4/18/15 | NSÍ - AB |
| 4/18/15 | FCS - HB |
| 4/19/15 | TB - Víkingur |
| 4/19/15 | ÍF - B36 |
| 4/19/15 | KÍ - EBS |

### TOPP 10 MÁLSKJÚTTAR:

| Nr | Navn | Mál | Felag |
|---|---|---|---|
| | Klæmint A. Olsen | 9 | NSÍ |
| | Finnur Justinussen | 5 | Vík |
| | Arnbjørn T. Hansen | 4 | HB |
| | Ibrahima Camara | 4 | B36 |
| | Andreas Lava Olsen | 4 | Vík |
| | Jónhard Frederiksberg | 3 | NSÍ |
| | Ari Ó. Ellingsgaard | 2 | ÍF |
| | Albert Adu | 2 | TB |
| | Árni Frederiksberg | 2 | NSÍ |
| | Jákup á Borg | 2 | B36 |

### MÁLSKJÚTTAR HJÁ ÍF:

| Navn | LK | SK | Tils. |
|---|---|---|---|
| Kristoffur Jakobsen | 1 | 2 | 3 |
| Ari Ó. Ellingsgaard | 2 | | 2 |
| Andy Ó. Olsen | 1 | 1 | 2 |
| Karl A. Løkin | 1 | | 1 |
| Áki Petersen | 1 | | 1 |
| Dánjal á Lakjuni | | 1 | 1 |
| Clayton Soares | | 1 | 1 |

### STØÐAN:

| Nr. | Lið | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | NSÍ | 5 | 4 | 0 | 1 | 17 | 8 | 9 | 12 |
| 2 | B36 | 5 | 3 | 2 | 0 | 11 | 5 | 6 | 11 |
| 3 | HB | 5 | 2 | 3 | 0 | 9 | 5 | 4 | 9 |
| 4 | Víkingur | 5 | 1 | 4 | 0 | 12 | 8 | 4 | 7 |
| 5 | TB | 5 | 1 | 3 | 1 | 7 | 6 | 1 | 6 |
| 6 | KÍ | 5 | 1 | 2 | 2 | 7 | 7 | 0 | 5 |
| 7 | AB | 5 | 0 | 5 | 0 | 4 | 4 | 0 | 5 |
| 8 | ÍF | 5 | 0 | 4 | 1 | 7 | 9 | -2 | 4 |
| 9 | EB Streymur | 5 | 0 | 3 | 2 | 6 | 12 | -6 | 3 |
| 10 | FC Suðuroy | 5 | 0 | 0 | 5 | 3 | 19 | -16 | 0 |




# JOHN's

COFFEE & DRINKS — KARVATOFTIR — FUGLAFJØRÐUR

## TÓNLEIKASKRÁ

11. APRÍL JENS TUMMAS NÆSS OG HANS RAVNSFJALL
18. APRÍL BRYNJA B. OG HANS ANDRIAS JACOBSEN
25. APRÍL EYÐUN NOLSØE
2. MAI BLACKSHEEP
9. MAI JENS MARNI HANSEN
16. MAI SÁMAL RAVNSFJALL
23. MAI UNI DEBESS
30. MAI FINNUR KOBA
6. JUNI GUÐRUN SÓLJA & JANUS KAMPMANN
13. JUNI HANS ANDRIAS JACOBSEN
20. JUNI SIGNAR Í HOMRUM & JOHN JOHANSEN

FÓTBÓLTUR
PREMIER LEAGUE OG CHAMPIONS LEAGUE

PUBQUIZ
HVØRT LEYGARKVØLD KL. 22

OPIÐ: FRÍGGJADAG 19—04 — LEYGARDAG 17—04 — SUNNUDAG 17—23

FYLG VIÐ Á FACEBOOK / JOHN'S Í FUGLAFIRÐI

Liðini í dag:

# ÍF – KÍ

1 Hallgrím G. Hansen (M)
2 Áki Petersen
3 Poul N. Mikkelsen
4 Sjúrður Jacobsen
5 Fritleif í Lambanum (L)
6 Margeir Toftegaard
7 Dánjal á Lakjuni
9 Kristoffur Jakobsen
10 Ari Ó. Ellingsgaard
11 Frank H. Poulsen
15 Jákup Oluf á Lakjuni
16 Karl A. Løkin
18 Clayton Soares do Nascimento
19 Levi Jøkladal
20 Leivur Joensen
21 Andrias Poulsen
22 Nenad Saric
23 Andy Ó. Olsen
24 Dánjal Pauli Højgaard
25 John Daniel Guðjónsson
28 Arnold Kristiansen
30 Adeshina A. Lawal
37 Jan Ó. Ellingsgaard
38 Predrag Markovic (M)
76 Bartal Eliasen

| | |
|---|---|
| Venjari | Aleksandar Jovevic |
| Hjálparvenjari | Poul Ennigarð |
| Hjálparvenjari | Eyðun Ryggshamar |
| Hjálparvenjari | Nunu Ánike |
| Hjálparvenjari | Jonn S. Thomsen |
| Liðleiðaraábyrgd | Dan Petersen |

1 Fríði Sigurðsson (M)
3 Ísak Simonsen
4 Jonas F. Rasmussen (L)
6 Sørmundur Kalsø
8 Jóannes Bjartalíð
9 Páll Klettskarð
10 Hjalgrím Elttør
12 Henry Heinesen
13 Petur Andreasen
14 Tórður Justesen
15 Ndende Adama Gueye
16 Meinhardt Joensen (M)
17 Evrard Ble
18 Heðin á Lakjuni
19 Jákup B. Andreasen
20 Mayowa Alli
21 Heðin Klakstein
22 Gunnar Christiansen
25 Kenan Hajdarevic

| | |
|---|---|
| Venjari: | Mikkjal K. Thomassen |
| Hjálparvenjari: | Símun Joensen |
| Liðleiðari: | Thom Jakobsen |
| Liðleiðari: | Sylvan Jakobsen |
| Liðleiðari: | Regin Sivertsen |

**Dómari:** Alex Troleis
**Hjálpardómarar:** Johnleif Gerðisá og Edvard Højgaard
**4. dómari:** Dan Højgaard
**Eygleiðari:** Tummas

Bóltstuðul: **Trúgvi Nesá**